# Vælkomin til dyst í Fløtugerði




HAVSBRÚN

## Leikskrá nr.2

2008

VÍKINGUR

leygardagur 19. mars 2016

effo
deildin

Mynd: Sigmar Mørkøre

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri



Vælkomin til Effodyst á Fløtugerði í Fuglafirði. Vit hava fingið viðmerkingar frá okkara liðformanni Jan O. Ellingsgard og tekur hann soleiðis samanum:

## Jøvn kapping

Málsetningurin í ár er greiður – topp 4. Tað er stórur gravgangur eftir hesum fýra plássunum, og tað er ikki uttan orsøk. Kappingin í ár tykist sera jøvn, og tað sær út til at øll lið kunnu taka stig frá øllum. At liðini tykjast jøvn, sæst eisini aftur í teimum báðum fyrstu umførunum av landskappingini í ár. Tað er ikki nakað lið, ið hevur fult stigatal, og tað er heldur einki lið, sum ikki hevur fingið nakað stig. Hetta er ikki hent síðani 1990 – altso í 26 ár. Tí síggi eg fram til eitt javnt og spennandi kappingarár, har alt kann henda.
Komnir í gongd
Kappingarárið hjá okkum byrjaði í Gundadali móti B36. Hendan dystin taptu vit, og tí skuldu vit reisa okkum seinasta vikuskifti, tá AB kom á vitjan. Hetta til fulnar, og við einum 1-0 sigri fingu vit okkara fyrstu stig til høldar. Í mun til fyrra dystin var verjan væl fyri, og um tað var nakað, sum kundi betrast, so var tað at vit burdu avgjørt dystin fyrr. Sum hini úrslitini lagaðu seg, eru vit nú bert eitt stig frá fremsta plássinum.

## Spennandi grannauppgerð

Sjálvur gleði eg meg altíð nógv til dystirnar móti Víkingi. Eg eri hálvur gøtuskurði, og havi nógva familju í Gøtu – hetta er nakað sum leggur eyka trýst á at vinna júst hendan dystin. Grannauppgerðin millum ÍF og Víking er nakað heilt serligt fyri bæði leikarar og viðhaldsfólk, og eru hesar ofta merktar av hørðum og intensum spæli, har leikararnir vilja gera alt fyri at vinna.
Spenningurin er ikki bert á vøllinum, men eisini millum fjeppararnar. Fyri okkum leikarar er tað nakað serligt at merkja stuðulin frá viðhaldsfólkunum, og tað gevur eyka orku til at vinna dystir. Í dag er einki undantak, og fara vit at gera alt fyri at vinna dystin. Koyr á ÍF!"

Spennandi verður at síggja okkara menn dystast í Føroya besta lokal-derby.
Hetta er fyrri heimadysturin hjá okkum móti Víkingi í ár, orsaka av onkrum programfeili hava vit tveir heimadystir móti teimum í ár.

**Koyrið á drongir.**
**Góðan dyst øll somul**

*Birgir*

Í 2015 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 01-03-2015 | Vík.-ÍF | 2-2 |
| 12 | 17-05-2015 | ÍF-Vík. | 1-3 |
| 21 | 16-08-2015 | Vík-ÍF | 4-2 |

Í 2014 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 04-05-2014 | Vík.-ÍF | 1-1 |
| 17 | 04-08-2014 | ÍF-Vík. | 2-2 |
| 25 | 05-10-2014 | Vík.-ÍF | 5-0 |

Í 2013 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 | 07-04-2013 | Vík.-ÍF | 3-2 |
| 14 | 21-06-2013 | ÍF-Vík. | 2-1 |
| 24 | 29-09-2013 | Vík.-ÍF | 2-1 |

Í 2012 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 | 21-04-2012 | ÍF-Vík. | 1-2 |
| 16 | 01-08-2012 | Vík.-ÍF | 1-4 |
| 23 | 12-09-2012 | Vík.-ÍF | 0-3 |

ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Tippikapping

Tippikapping Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest røtt svar.

Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| **NSÍ** | **ÍF** | | | | |
| KÍ | Skála | | | | |
| B36 | AB | | | | |
| TB | HB | | | | |
| Víkingur | B68 | | | | |

Navn:

Telefonnummar





## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

NORÐOYA SPARIKASSI



www.ns.fo

Netbankin
sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

Opnigstíðir:
Mána. - Fríggjadag
8:00 – 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

www.gassola.fo

# Nevndin



FORMAÐUR:
LEIF ANDRE ELIASEN
Er útlærdur timburmaður. Fer undir sítt fjórða ár í nevndini



NÆSTFORKVINNA:
DURITA TOFTEGAARD
Er mamma til Margeir Toftegaard. Hevur áður sitið fleiri ár í nevnd, og fer undir sítt næsta skeið. Útbúgvin skrivstovukvinna



PENINGARØKIL:
TÓRMÓÐUR TRAÐARÁ
Er pápi til Tóra Traðará, og er giftur við fastur Karl A. Løkin. Er nýggjur í nevndini. Útbúgvin skipari, men starvast sum handverkari



SKRIVARI:
KATRIN Á LAKJUNI
Er systkinabarn til Dánjal á Lakjuni, útbúgvin lærari og fer undir sítt næsta ár



NEVNDARLIMUR:
EDVA JACOBSEN
Fyrrverandi tingfólk fyri Sambandsflokkin, útbúgvin bankakvinna og mamma til Vincent S. Jacobsen, ið spældi við okkum, til hann flutti av landinum



EYKALIMUR:
BIRGAR LARSEN
Er beiggi Ólavur Larsen, sum fyrr var formaður í nøkur ár. Eigur og rekur John's, umframt at hann hevur vant m.a. unglingar hjá okkum fyri nøkrum árum síðan

# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum.

Eftir sigurin á Boga síðsta dysti, var Leivur Joensen næstur mótstøðumaður. Av tí at báðir eru ídnir Liverpool fjepparar, so ber spurnarkappingin brá av hesum. Sum sæst á svarunum, so er ivasamt hvat teir báðir vita um sítt yndisfelag í útlandinum. Leivur visti tó allar tríggjar ÍF spurningarnar, men sjálvt um Heri fekk eitt hálvt minusstig, so dró hann longra stráið og vann sannførandi 9,5-7. Heri verður sostatt aftur til komandi heimadyst, tá hann fer at dystast mótinum einum øðrum av leikarunum á effoliðnum.
Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | LJ | HHN |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hvussu eitur leikarin, ið ikki longur er liðskipari hjá Randers, av tí hann hevur fingið sær fyrrverandi konuna hjá einum viðleikara? | Jonas Borring | Christian Keller | Mads Agesen | 1 | 1 |
| 2 | Hvussu eitur fyrrverandi Sunderland málmaðurin, ið andaðist í november í fjør? | Marton Fulop | Pavel Srnicek | Mart Poom | 1 | 1 |
| 3 | Hvussu nógv mál hevur Frank Lampard skotið fyri enska landsliðið? | 27 | 28 | 29 | 0 | 1 |
| 4 | Úr hvørjum landi er fyrrverandi Liverpool leikarin Titi Camara? | Guinea | Gabon | Senegal | 0 | 1 |
| 5 | Hvør skeyt fyrsta málið, sum ÍF fekk í hesi øldini? | Mortan Sólheim Thomsen | Rúni Petersen | Ken Bærentsen | 1 | -0.5 |
| 6 | 4. juni 2008 spældi Føroyar vinardyst móti Estlandi. 2 ÍF-leikarar vóru á beinkinum hendan dystin. Hvørjir? | Bartal Eliasen og Høgni Zachariassen | Fritleif í Lambanum og Andy Ó. Olsen | Høgni Madsen og Áki Petersen | 1 | 1 |
| 7 | Hvørjum blusunummari spælir Kevin Pince-Boateng við, tá hann umboðar AC Milan? | 72 | 27 | 8 | 0 | 1 |
| 8 | Hvussu eitur staðið, har Royn spælir sínar heimadystir? | á Klettbergi | Undir Heygum | á Skørðunum | 0 | 0 |
| 9 | Í HM finaluni í 2006, tá Zidane fekk reytt kort í sínum síðsta dysti, hvør brendi tá brotsspark fyri Frakland í brotssparkskappingini? | Florent Malouda | David Trezeguet | Thierry Henry | 1 | 1 |
| 10 | Til hvat felag seldi Liverpool Robbie Fowler? | Blackburn Rovers | Manchester City | Leeds United | 0 | 1 |
| 11 | Hvør spældi flest minuttir fyri ÍF í 2012? | Høgni Zachariassen | Jan Ó. Ellingsgaard | Karl A. Løkin | 1 | 1 |
| 12 | Hvør er landsliðsvenjari hjá U18 gentum hjá Føroyum? | Jens Martin Knudsen | John Petersen | Allan Mørkøre | 1 | 1 |
| 13 | Hvør var "player of the season" hjá Liverpool kappingarárið 2002/2003? | Danny Murphy | Michael Owen | Dietmar Hamann | 0 | 0 |
| | Tilsamans | | | | 7 | 9.5 |

Rætt svar: X – 1 – 2 – 1 – X – 2 – 1 – 2 – X – 2 – 1 – X – 1




Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**


usedbaader.biz
BAADER service
OG SMIÐJUARBEIÐI
Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.
Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.
Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.
BAADER
Food Processing Machinery
fomaco
Ubro SystemPac
euskan++
Tel 775 775
www.pl.fo
peturlarsen


CAPTO
TIL FLÓTITROL
RÆTTILIGA FANGANDI
CAPTO er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum VÓNIN hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com
VÓNIN®


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein • Falkavegur 6 • Postboks 3229 • FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 • Fax +298 344 601 • www.krosstein.fo • krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

## Hagtøl

### HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 19/3/16 | NSÍ – Skála |
| 20/3/16 | HB – KÍ |
| 20/3/16 | ÍF – Víkingur |
| 20/3/16 | TB – AB |
| 20/3/16 | B68 – B36 |

### KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 2/4/16 | NSÍ – ÍF |
| 3/4/16 | KÍ – Skála |
| 3/4/16 | B36 – AB |
| 3/4/16 | TB – HB |
| 3/4/16 | Víkingur – B68 |

### TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Nr Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Filip Djordjevic | 2 | Vík. |
| Jógvan A. Skeel Nolsøe | 2 | B36 |
| Hákun Edmundsson | 2 | B68 |
| Klæmint A. Olsen | 2 | NSÍ |
| Álvur F. Christiansen | 1 | Skála |
| Andreas Lava Olsen | 1 | Vík. |
| Andy Ó. Olsen | 1 | ÍF |
| Ari M. Olsen | 1 | HB |
| Árni Frederiksberg | 1 | NSÍ |
| **Bogi Reinert Petersen** | **1** | **ÍF** |

### MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | LK | SK | Tils. |
|---|---|---|---|
| Bogi Reinert Petersen | 1 | 0 | 1 |
| Andy Ó. Olsen | 1 | 0 | 1 |

### STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 2 | 1 | 1 | 0 | 5 | 2 | 3 | 4 |
| 2 | HB | 2 | 1 | 1 | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 3 | B36 | 2 | 1 | 0 | 1 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 4 | NSÍ | 2 | 1 | 0 | 1 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 5 | KÍ | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 6 | Skála | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 4 | -2 | 3 |
| 7 | ÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 4 | -2 | 3 |
| 8 | B68 | 2 | 0 | 2 | 0 | 2 | 2 | 0 | 2 |
| 9 | TB | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 10 | AB | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |

## Liðini í dag

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Poulsen | |
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 8 | Bogi R. Petersen | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 13 | Hallgrím G. Hansen | (M) |
| 14 | Dánjal Pauli Højgaard | |
| 15 | Oliver Korch | (M) |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Jógvan Martin Olsen |
| Hjálparvenjari: | Jákup Mikkelsen |
| Liðleiðari: | Ólavur Larsen |
| Liðleiðari: | Trúgvi Nesá |
| Liðleiðari | Dan Petersen |

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Geza Turi | (M) |
| 2 | Andreas Lava Olsen | |
| 3 | Hanus Jacobsen | |
| 4 | Atli Gregersen (L) | |
| 5 | Dánjal Pauli Lervig | |
| 6 | Sámal Jákup Joensen | |
| 7 | Jón Krosslá Poulsen | |
| 8 | Heðin Hansen | |
| 9 | Filip Djordjevic | |
| 10 | Sølvi Vatnhamar | |
| 11 | Hans Pauli Samuelsen | |
| 12 | Bárður J. Hansen | |
| 13 | Erling D. Jacobsen | |
| 14 | Magnus Jarnskor | |
| 15 | Jákup V. Olsen | |
| 16 | Hans Jørgen Djurhuus | |
| 19 | Jobin Drangastein | |
| 20 | Hjalti Strømsten | |
| 21 | Gert A. Hansen | |
| 24 | Gunnar Vatnhamar | |
| 27 | Elias Rasmussen | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari | Sámal Erik Hentze |
| Hjálparvenjari | Sorin Anghel Vasile |
| Málmansvenjari | Eugen Voda |
| Fysioterapeutur | Rannvá Lava Olsen |
| Liðleiðari | Álvur Joensen |
| Liðleiðari | Jan Eli Dam |
| Liðleiðari | Jógvan Marius Hansen |
| Liðleiðari | Magni Jarnskor |

Bóltstuðul er Petur Abrahamsen

Dómari: Alex Troleis
Hjálpardómarar: Andrew Christiansen og Dia Lamhauge
4. dómari: Bjarki Danielsen
Eygleiðari: Lassin


sponsored
by
INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur


Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Tróndur í Gøtu
Finnur Fríði
Jupiter
Tummas T
Saksaberg
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
pl stórbilar
verkstaður & søla
Tel 765 765 · www.pls.fo

VEST PACK

*...meira enn pakkitilfar!*

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakkimaskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin víða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat víðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo

Allar vanligar umvælingar

Dekksøla

Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**

**Tlf. 441111**



Ætlar tú at selja tíni hús í Fuglafirði ?

- vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37

Tórshavn | Tel 348 900

inni@inni.fo | inni.fo

INNI

Vitja handil okkara á Hjalla

Her fær tú alt innan vask og reingerð á einum stað



KEMILUX

www.kemilux.fo



# ÍF sjeyti ár

Signar á Brúnni



Nú triði landskappingardystur 2016 verður spældur í ár millum Víking og ÍF, kunna vit staðfesta og kunngera, at Ítróttarfelag Fuglafjarðar hevur sjeyti ára føðingardag í ár.

Felagið varð stovnað ella rættari sagt endurstovnað í 1946.

Herluf Berthelsen var fyrsti formaður. Hinir nevndarlimirnir vóru Pól Jacob Hansen, Obert Eliasen, Sofus Eliasen og Martin Johannesen.

Í 1940 varð farið undir at gera leikvøll í Fløtugerði, og tá ið felagið var farið at virka, tók tað arbeiðið upp á vøllin upp á seg.

Í 1956 var hann liðugur og alment tikin í nýtslu.

Í 1979 vaks kommunan hann, so hann hevði tey góðtiknu mátini.

Fyri einum ári síðani varð vøllurin breiðkaður, so hann lýkur krøvini, ið verða sett í dag.

Vøllurin hevur sanniliga verið ein góð íløga.

Hann varð gjørdur mitt í bygdini, so hann eisini kundi nýtast sum spælipláss hjá børnum. Stóran part av árinum verður vøllurin nýttur frá tíðla á morgni til seint á kvøldi og mong eru tey, ið hava havt stóra gleði av honum.

Teir gomlu, ið laðaðu vøllin, eru allir farnir undir grønu torvu, og sigast má, at teirra arbeiðið er væl úr hondum greitt, ja hann er við at fríðka okkara vøkru bygd/bý.

Ímyndi tykkum, at ístaðin fyri grótlaðing varð betong nýtt ?

Fuglfirðingar spældu fótbólt í mong ár í næstbestu deildini og kláraðu teir seg rættiliga væl.

Í 1971 tók felagið ta avgerð, at ÍF skuldi taka lut í bestu deildini.

Meg minnist, at ikki øll vóru so fegin um tað, tí hildið var, at vit fóru ikki at megna at spæla í bestu deildini.. Men vit, ið høvdu tosað fyri at flyta upp, høvdu áræði og dirvi, og satt at siga, gekk tað hamuliga.

Men vit sum tá spældu á liðnum, vistu, at vit áttu yngri spælarar, ið fóru at megna tað nógv betri enn vit, so vit sóu nøkur ár fram.

Vit fingu rætt, í 1979 vann ÍF meistaraheitið í bestu deildini í fótbólti – tá var lív í býnum.

Vit plaga at siga við børnini, tá ið tey fylla, hvat tey ynskja sær í føðingardagsgávu og vit fáa næstan altíð eitt skjótt og greitt svar.

Spyrja vit ÍF – stuðlarnar í dag, so eri eg vísir í, at svarið verður: Sigur móti Víkingi í dag og at vit verða millum tey fýra ovastu liðini, tá kappingin er liðug.

Kappingin er nú byrjað, og vit vóna at okkara lið ÍF fær eitt gott ár, ið merkir, at tað kemur at liggja væl hægri á stigatalvuni, enn tað gjørdi í fjør.

ÍF – liðið hevur fingið nýggjan venjara í ár. ið hevur drúgvar fótbóltsroyndir og mangan við góðum úrslitum. Fuglfirðingar ynskja venjaranum vælkomnum til Fuglafjarðar og vóna, at hann megnar at styrkja flaggskip okkara og at spælarar okkara leggja alla sína orku í at fáa góð úrslit og verða væl stuðlað av ÍF – viðhaldsfólki.

Lyfta vit í felag, so megna vit so nógv meira!







Jógvan Weihe

Stiðjagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · Fax 35 38 98

Salong Halda.fo

Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:
Mánadag 9.00 - 17.00
Týsdag 9.00 - 19.00
Mikudag 9.00 - 19.00
Hósdag 9.00 - 18.00
Fríggjadag 9.00 - 17.00
Leygardag 9.00 - 13.00
Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA

Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo

Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo

510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo




KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

GER
SJÓLÍVIÐ
LÆTTARI

KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík Tel. +298 472030 Fax: +298 472031 T-postur: kss@kss.fo www.kss.fo


5 leikarar, ið bara hava umboðað ÍF - allir skrásettir dystir

| Leikari | Kappingarár | Dystir | Mál |
|---|---|---|---|
| Torstein Joensen | 21 | 270 | 22 |
| Roy Róin | 17 | 295 | 17 |
| Eyðolvur R. Petersen | 16 | 287 | 54 |
| Frank H. Poulsen | 12 | 240 | 19 |
| Nenad Saric | 10 | 252 | 47 |




| | |
|---|---|
| Navn: | Oliver Korch |
| Føðingardagur: | 18.06.1994 |
| Føðistað: | Smørum, Danmark |
| Starv: | Cafe Cibo |
| Pláss á vøllinum: | Målmand |
| Yvirtrúgv: | Nej |
| 3 orð sum lýsa teg: | Glad, Drengerøv. Vinder |
| Torførasti mótstøðumaður: | Raheem Sterling (Som u17 spiller) |
| Frítíðarítriv: | Fiske |

Vónir fyri 2016/17: Jeg håber på af få et godt år på Færøerne, både som fodboldspiller og som person. På det fodboldmæssige plan håber jeg på personlig succes, samt af vi som hold klarer vores målsætning.
På det menneskelige plan håber jeg på af finde mig selv 100 procent og finde ud af hvilken retning i livet jeg vil gå

## Tín Ítrótt:

Fyrsti dystur á 1.liðið: Marst 2015 (Hvidovre)
Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: Januar 2016
Aðrar ítróttargreinar: Nej
Minniríkasti dystur: U17 VM i Mexico mod Brasilien foran 35000 mennesker.
Største fótbóltsliga ávirkan: Der er 2 som har lært mig utrolig meget som fodboldspiller og som person. De har hjulpet mig igennem de svære perioder som fodboldspiller. Lars Friis aom er nuværende assistent i AGF, og min tidligere U Landstræner igennem 4 år, Thomas Frank.
Besti fótbóltsleikari: Messi
Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: Det er svært at svare på, Men tror det ville være håndbold.
Hvat slag av venjing dámar tær best: Spil på 2 mål
Hvat slag av venjing dámar tær ikki: Jeg tror alle fodboldspillere hader af træne taktisk træning . Men det er en vigtig del af spilet så det skal gøres.

## Tínir favorittar:

Matur og drekka: En god jordbær smoothie og min livret er tapas
Slag av tónleiki: Jeg vil sige af jeg har en meget blandet musik smag. Men Justien Bieber er farvoritten.
Sjónvarpssending: Bonderøven
Troyggja nr: 15
Besti fótbóltsleikari nakrantíð: Messi
Sjónvarp/filmstjørna: Nikolaj Lie Kaas
Besta bók/blað: Den hemmelige fodboldspiller
Stuttligasti persónur: Jeg vil sige min tidligere målmandskollega Steffen Petersen, Han er verdens sjoveste mand.
Stuttligasti í ÌF hópinum: Det kan der kun være en mening om. ARI!!

## Leikarafakta:

- Hansara fulla navn er Oliver Nickolai Djuraas Korch
- Hevur royndarvant í m.ø. Inter í Italia og Stoke í Onglandi
- Ein av hansara bestu vinum er Andre Rømer, sum til dagliga spælir við FC Midtjylland
- Hevur spælt við U16, U17, U18, U19 og U20 lansliðunum hjá Danmark, og er tilsamans skrásettur fyri 37 ungdómslandsdystir.
- Hóast hann er málverji, velur hann aldrin blusu nummar 1.
- Hevur áður spælt við FC Midtjylland, Hobro, Hvidovre og B1908.
- Av leikarum, ið hann hevur spælt saman við kunnu t.d. Victor Fisher í Ajax, Pierre Emil Højbjerg í Schalke 04 (útleigaður frá Bayern Munchen), Lasse Vigen í Fulham og Yussuf Poulsen í RB Leipzig nevnast.

Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRDSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara
hansara og børnini, nú alt undir somu lon"

S/PF AP BUSSKOYRING
– altíð til dystin fús



Ring til okkum á
Tel 23 52 50 · buss@buss.fo




JOHN's
KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR
LIVANDI TÓNLEIKUR
HVØRT VIKUSKIFTI
ALTÍÐ PUBQUIZ
LEYGARKVØLD KL. 22
OG VIT VÍSA SJÁLVANDI
DYSTIRNAR!
OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23
FYLG VIÐ Á FACEBOOK / JOHN'S Í FUGLAFIRÐI